# Útróðrarbátarnir hava góðan fiskiskap

**– Útróðrarfiskurin gongur inn í okkara framleiðslu, sum annar fiskur. Kósin er eitt stórt fiskavirki, sum keypir fleiri fiskasløg og hevur ávísar framleiðslur. Vit gera ikki mun á útróðrarfiski og øðrum fiski í framleiðsluni, sigur Klæmint Hansen, virkisleiðari**

ÚTRÓÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*Jákup Sólstein, formaður í Reiðarafelagnum, gekk sær eisini ein túr eftir bryggjuni hendan dagin*
*Mynd: Jan Müller*

Seinastu tíðina hevur veðrið verið gott, og væl av útróðrarfiski er komið uppá land í bygdum, har útróður er. Streymurin hevur verið góður, men sum skilst, er hann nú harðnandi.

Klaksvíkin er gomul útróðrarbygd, og tað var tann tíð, tá ið henda vinna at kalla var altavgerandi fyri trivnaðin á staðnum.

Men alt broytist og flytir seg, og soleiðis er eisini við vinnuni. Og tó; framvegis í dag breyðføðir útróðurin nógvum familjum í Klaksvík og aðrastaðni kring landið, og í egningarskúrunum standa enn ung sum eldri og syrgja fyri, at útróðrarbátarnir hava nóg mikið av egndari línu til næstu setu.

So hvørt, sum fiskiskipaflotin og virkini eru vorðin størri, er týdningurin av útróðrinum lutfalsliga minkaður. Men tað vildi verið eitt undarligt og fátæksligt føroyskt samfelag við ongum útróðrarbátum, ongum útróðrarmonnum og ongari egning.

## Einki ber til

Nú smápláss eru við at doyggja út, kundi ein gongd leið kanska verið at vent aftur til tíðina, tá ið útróður og fiskakjallari var á nógvum bygdum, har eingir aðrir vinnumøguleikar vóru.




*Útróðrarbátarnir hava fingið væl av fiski seinastu tíðina, nú veðrið hevur verið so gott*
*Mynd: Jan Müller*

Men tað nyttar ivaleyst einki at tosa um hesi viðurskifti í dag, tí samfelagið er so nógv broytt, og krøvini til hetta og hitt eru so nógv økt.

Fyrr var vanligt, at handilsmaðurin í bygdini hevði ein fiskakjallara, har eini 15-20 fólk stóðu og flaktu og saltaðu fisk. Menninir, sum áttu bát, kundu rógva út í tí góðu tíðini á árinum og sleppa av við fskin á staðnum.

Tey, ið eru tilkomin og vaksin upp á smáplássunum, minnast hugnaligu kvøldini, tá ið bátarnir komu aftur at landi við stórum og góðum fongi. Dagin eftir stóðu hurðarnar í fiskakjallaranum opnar oman á bryggjuna, og menn og kvinnur kundu tjena sær nakrar krónur.
Í dag ber einki til.



*Vælnøgdur útróðrarmaður á Kósabrúnni leygardagin*
*Mynd: Jan Müller*

## Eftir Kósabrúnni

Seinasta leygardag gekk blaðstjórin á Sosialinum sær ein túr eftir Kósabrúnni og tók nakrar myndir av útróðrarbáti, sum lá og landaði. Á bryggjuni møtti hann útróðrarmonnum, og hann møtti eisini Jákupi Sólstein, formanni í Føroya Reiðarafelag, sum altíð er fryntligur at hitta.

Bátur við nógvum fiski lá við bryggjuna, og menn vóru væl nøgdir við fongin hendan dagin.

Klæmint Hansen, sum er virkisleiðari á Kósini, veit at siga, at útróðrarbátarnir hava havt góðan fiskiskap í seinastuni, nú veðrið hevur verið so gott. Teir, ið royna við línu, hava javnan ligið millum 100 og 200 pund á stampin, og í seinastuni hevur meiri enn helmingurin av veiðini verið hýsa. Men tað veldst um, hvar bátarnir royna. Hinvegin hevur lági hýsuprísurin havt við sær, at útróðrarmenn hava ligið meira eftir toskinum.

Kósin hevur landingarmiðstøð, men sum oftast er tað Fiskamarknaðurin, sum landar fyri Kósina.

– Vit keypa hesa tænastu frá Fiskamarknaðinum, sum hevur sítt egna fólk til endamálið, sigur Klæmint.

Hann veit at siga, at nakrir útróðrarbátar landa burtur av til Kósina og fara tískil ikki um uppboðssøluna við fiskinum, men hesir eru tó undantakið.

## Flestu við línu

– Flestu útróðrarbátarnir í Klaksvík royna við línu, eisini um várarnar, tá ið menn aðrastaðni plaga at leita norður um at royna eftir várfiski. Tað eru tó nakrir av teimum smáu bátunum, sum leggja um, meðan norðhavsróðurin er. Teir stóru útróðrarbátarnir í Klaksvík, úr 30-40 tonsum og uppeftir, royna vanliga við línu alt árið og leggja ongantíð um til snellu.

Umleið helmingurin av ráfiskinum, sum Kósin keypir, keypir virkið beinleiðis frá skipum og bátum. Hin helmingurin verður keyptur á uppboðssølu.

– Hesa tíðina er útboðið av útróðrarfiski vanliga nokkso stórt, og tað plagar at ganga útyvir prísirnar.

Klæmint heldur tó ikki, at nakað serligt er at siga um prísgongdina beint nú.

– Útróðrarfiskurin gongur inn í okkara framleiðslu, sum annar fiskur. Kósin er eitt stórt fiskavirki, sum keypir fleiri fiskasløg og í fyrsta lagi tosk, hýsu og upsa. Í framleiðsluni gera vit ikki mun á útróðrarfiski og øðrum fiski, sigur Klæmint Hansen, virkisleiðari. Stjóri á Kósini í Klaksvík er Hanus Hansen.



# Jógvan er ársins 1. hjálpari

**– Eg gjørdi ikki annað, enn eg hevði vónað, at onkur annar gjørdi fyri meg, um eg kom illa fyri, sigur Jógvan Mørkøre, sum týsdagin var kosin ársins 1.hjálpari av Reyða Krossi. Tær tríggjar genturnar, Sarah á Rógvu Rasmussen, Marjun Reginsdóttir og Una Súsanna Skaalum vórðu eisini heiðraðar**

ÁRSINS FYRSTI HJÁLPARI
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Jógvan Mørkøre úr Hósvík er ársins 1. hjálpari fyri at hjálpa einum illa støddum manni í fjørsummar*
*Mynd: Óli Jacobsen*

Á samkomu í hølunum hjá Reyða Krossi týsdagin varð 48 ára gamli Jógvan Mørkøre úr Hósvík heiðraður sum ársins 1. hjálpari 2003. Hetta er triðju ferð, at Reyði Krossur heiðrar ársins 1. hjálpara í Føroyum.

## Vendi við

Í juni mánaði í fjør kom Jógvan Mørkøre á ein mann, sum hevði skorið seg illa norðanfyri Áir. Menn vóru farnir eftir seyði og ein teirra er áhalsin og stingur seg illa í annan tjúkkan. Hann bløddi sera illa og menninir á staðnum royndu at lyfta beinið fyri at steðga bløðingini.

Jógvan Mørkøre er á veg úr Oyrarbakka til Hósvíkar og varnast at okkurt er áfatt, men koyrir framvið monnunum, tí hann væntar, at menninir høvdu tamarhald á støðuni.

Komin nakað framvið monnunum, ger Jógvan Mørkøre kortini av at venda við aftur, tí møguliga kann hann hjálpa manninum. Komin á staðið, sær hann, at maðurin hevur skorið seg illa í tjúkkan og við hjálp av fyrstu hjálpar skjáttuni, fær hann steðga ógvusligu bløðingini.

Tá sjúkrabilurin kom á staðið, varð havt á orðið, at arbeiðið hjá Jógvani var ómetaliga væl úr hondum greitt.

## Trý boð

Umframt Jógvan Mørkøre, vóru tvey onnur evni í uppskoti til at gerast ársins 1. hjálpari. Løgreglufólkini, Lars Muller og Mariann Reinert vórðu tilkallað 21. juni 2003, tí uttanfyri Havnar Klubba var ein maður dottin og svímaður.

Tey góvu honum andahjálp og hjartamassasju, so maðurin kom seg aftur. Lars og Mariann fingu seinni eina heiðursgávu frá Ríkisløgregluni fyri avrikið

Løgreglumaðurin, Sigmund Petersen, var eins og Lars Müller og Mariann Reinert, í uppskoti til ársins 1. hjálpara. Sigmund varð boðsendur til eitt ferðsluóhapp norðuri við Áir í fjørsummar.

Sagt verður, at hann var umhugsin og gav teimum skaddu teppir og sín egna jakka at verma seg við. Sigmund gav eisini teimum løstaðu andahjálp. Sigmund Petersen fekk eisini heiðursgávu frá Ríkisløgregluni fyri sítt avrik.

## Mín skylda

Ársins 1. hjálpari, Jógvan Mørkøre, gjørdist ikki sørt bilsin av at verða kosin ársins 1. hjálpari. Hann sigur seg altíð havt stóran áhuga í 1. hjálpararbeiði

Jógvan tók 1. hjálparaskeiðið í 1979 og síðan hevur hann altíð havt 1. hjálparskjáttuni við sær í bilinum og í bátinum.

– Sum ungur fekk eg ofta lúsingar av ymsum slag. Tá var ikki bara at siga tað at fara til lækna og tískil var tað ofta mamma, sum kom mær til hjálpar. Áhugin fyri sjúkrarøkt er helst komin av at síggja mammu á ungum árum. Áhugið fyri sjúkrarøkt er eisini í familjuni, tí systrarnar hjá mær eru ávikavist sjúkrahjálpari og sjúkrasystur, sigur Jógvan Mørkøre.

Hann dylir ikki fyri, at tað er fløvandi at fáa slíka heiðursgávu, men leggur afturat, at hann gjørdi ikki meir enn sína skyldu.

– Eg gjørdi ikki annað, enn eg hevði vónað, at onkur annar gjørdi fyri meg, um eg kom illa fyri, sigur hann

## Børnini duga eisini

Tað eru ikki bert løgreglufólk og kommunalpolitikkarar sum hava eginleika at hjálpa illa støddum fólki. Fyri góðum ári síðan vóru tær tríggjar genturnar Sarah á Rógvu Rasmussen, Marjun Reginsdóttir og Una Súsanna Skaalum á veg úr skúlanum.

Tað var kalt í verðinum og tær tríggjar fingu hugskotið at fara út á ísin við Havnará. Sarah var fyrst á ísin, men datt gjøgnum ísin. Marjun roynir at koma Saruh til hjálpar, men hon fer eisini gjøgnum ísin.

Eftir stendir Una, sum sær, at tað ber ikki til at fara út á ísin, tí so dettur hon eisini ígjøgnum. Una rennir tí eftir hjálp og komin oman um Skótahúsið við Havnará møtir hon Ingun Hentze og saman fáa tær Marjuna og Saruh upp á turt aftur í øllum góðum.
Á samkomuni fingu tær tríggjar genturnar hvør sítt krúss frá Reyða Krossi, meðan Ingun Hentze fekk eitt hálsprýði.

### Fakta

**Evnini til ársins 1. hjálpara**

**Jógvan Mørkøre:**
Maður skorið seg illa

**Lars Müller og Mariann Reinert:**
Maður dottin og svímaður

**Sigmund Petersen:**
Ferðluvanlukka



*Tær tríggjar genturnar Sarah á Rógvu Rasmussen, Marjun Reginsdóttir og Una Súsanna Skaalum vórðu eisini heiðraðar av Reyða Krossi. Aftanfyri sæst Ingun Hentze sum kom gentunum til hjálpar*
*Mynd: Óli Jacobsen*

## The Darkness vóru stóru vinnararnir

Í gjárkvøldi vóru vinnararnir av Brit Awards kosnir í London. Bólkurin, The Darkness, steyk avstað við trimum heiðurslønum, meðan Justin Timberlake var teimum næstur við tveimum

Her eitt yvirlit yvir vinnararnir av Brit Awards 2003

**British Male solo artist:**
Daniel Bedingfield

**British Group**
**British Rock Act**
**Mastercard British Album**
The Darkness

**British Female Solo Artist**
**British single (White Flag)**
Dido

**International Male Solo Artist**
**International Album (Justified)**
Justin Timberlake

**British Dance Act:**
Lemar

**British Dance Act:**
Basement Jaxx

**British Breaktrough Artist:**
Busted

**International Female Solo Artist:**
Beyonce Knowles

**International Group:**
White Stripes

**International Breakthrough Artist:**
50 Cent

**Outstanding Contribution;**
Duran Duran